# 56. tími - Hans Andrias Djurhuus




Hans Andreas Djurhuus varð føddur í Áarstovu í Havn í 1883. Tá hann var liðugur at ganga í barnaskúla, fór hann til skips, men hann treivst ikki væl. Í 1901 fór hann á háskúla í Føgrulíð, har hann á fyrsta sinni fekk undirvísing á føroyskum.

Í 1902 fór hann á læraraskúla í Havn og tók prógv í 1905. Eftir lokið prógv var hann lærari í Klaksvík, og seinni fór hann niður á danska læraraháskúlan í Keypmannahavn til víðari lesnað. Tá hann kom heim aftur, stovnaði hann privatskúla í Havn.

Seinni var hann lærari í Sandavági. Har skrivaði hann barnasøgur og sangir. Tá hann skuldi læra børnini í skúlanum, fann hann ofta sjálvur upp á onkra søgu ella onkran sang at brúka í tímanum. Í 1916 flutti hann suður á Tvøroyri at vera fyrstilærari, men í 1919 flutti hann aftur til Havnar. Hann var lærari í Realskúlanum og á Føroya Læraraskúla heilt til hann doyði í 1951.

Hans Andreas Djurhuus hevur roynt seg á øllum økjum: barnasangir, ævintýr, tjóðskaparsangir, sjómansrímur, sálmar, stuttsøgur bæði til børn og vaksin, sjónleikir og skaldsøgur.

**Ymisk frímerki frá 2003**
Edvard Fuglø hevur teknað




*„Ein firvaldur"*




*„Dukka mín er blá"*




*„Kongaríkið í Babylon"*




*„Góðan morgun ketta mín"*



***Frá vinstru:*** *Janus Djurhuus, Jørgen-Frantz Jacobsen, William Heinesen og Hans A. Djurhuus*